# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Frans Malling Mortensen, Dragør**, andaðist mikudagin, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Dragør kirkju fríggjadagin 9. oktober.

**Jóhannes Danielsen, Tórshavn**, vanliga nevndur Hannis, andaðist í Eldrasambýlinum oman Mattalág mánadagin, 89 ára gamal.

**Kristin Eliasen, Klaksvík**, vanliga nevnd **Vinna**, andaðist í heiminum mánadagin, 82 ára gomul. Farið verður úr kapellinum mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Vinne, kunnu lata Klaksvíkar Sjúkrahús eina gávu, konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri maður, pápi og verpápi

**Jóhannes Danielsen**
(vanliga nevndur Hannis)
Tórshavn

andaðist á Eldrasambýlinum Oman Mattalág mánadagin 5. okt. 89 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikudagin 7. okt. kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin 8. okt. kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Lena og Jóhannes**

Tey, ið vilja minnast Hannis við blómum ella kransi, kunnu lata eina peningagávu til Frelsunarherin í Havn.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi, abbi og langabbi

**Poul Johannes Zachariassen**
Tórshavn,
ættaður av Sandi

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Hera Joensen, prest, og tykkum øllum, sum hjálptu okkum so væl við jarðarferðini og ervinum.
Takk til heimatænastuna.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Javna.
Takk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til gravar.

*Familjunnar vegna*
**Frida, Marit og Kristbjørg**

Grønlandstíðindi:

# 80 år i børnenes tjeneste




Ummannaq Børnehjem fylder 80 år. Børnehjemmet er kendt langt udenfor Grønlands grænser for sit usædvanlige høje faglige niveau, og socialpædagoger overalt i rigsfælleskabet og i hele Norden taler med den dybeste respekt om det pædagogiske arbejde i Ummannaq. Mange børn har fået grundlagt en ny tilværelse på det nordgrønlandske børnehjem, hvor der er masser af liv og musik og hundeslædekørsel - alt sammen anført af forstander Ann Andreassen, som for et par uger siden modtog Gerda-prisen, der er en af rigets mest prestigefyldte anerkendelser for pædagogisk arbejde.

Tað er stuttligt tá ið føroyingar fáa slíka viðurkenning uttanfyri landoddarnar. Ann er dóttir Mariu og Karl Andreassen úr Klaksvík. Ein abbi Ann var Kaj í Hvannasundi

**Dagurin**
**7. oktober. Amalia.** Teir vita um onga halgikvinnu við hesum navni, men navnið er einaferð komið í álmanakkan í staðin fyri Birgitta, ið helst er Birgitta úr Vadstena í Svøríki. Ein halgisøga sigur, at Pippingur (abbi Karlamagnus) vildi hava Amaliu til hjákonu, men hon vildi ikki játtast honum og gav seg í kleystur, har hon doyði í 772. Navnið er kanska gotiskt, og merkir íðin.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*


Les Sosialin so ert tú við




Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.
Tel. 34 18 00
lysing@sosialurin.fo
Ring og fá ein prís!
Sosialurin